– trygt og ómakaleyst til hús



# Ein perla í Havn

**Tú ert at kalla mitt býnum, men tá tú ert inni á ognini kennir tú teg so at siga burtur í øðrum heimi.**









## Fyrsta fatanin

Tú koyrir niðan til endan á Dalavegnum, snarar til høgru inn í Dalastíg og sært við tað sama, at hetta eru ein heilt serstøk ogn, ið liggur sera væl fyri, og sum er stór í mun til økið og hevur sera gott útsýni yvir alla Havnina. Húsini eru bygd til bústað og sum eini marglætishús, og dygd, snið og innrætting er hareftir. Innkoyringin er opin og ljós og løgd við føroyskum gróti. Alt signalerar við tað sama góðsku og dygd.

## Uttanfyri og uttanum

Grundøkið er plantað við høgum gomlum trøðum, og arkitektteknaðu húsini við flagtaki eru sett á stykkið, so tey spæla sera væl saman við umhvørvinum. Tað sært tú sera væl, tá ið tú hyggur frá vegnum oman yvir húsini. Samstundis sum fjálga og hugnaliga umhvørvið gevur tær ta besta úr føroysku náttúruni, gevur dámligi urtagarðurin tær ein farra og ein stemning av fjarskotnum himnahválvum. Ognin kann nýtast til mong ymisk endamál, og húsini eru sera væl egnað til umboðandi (repræsentativ) endamál, og samstundis kann bústaður og arbeiðspláss vera í sama húsi og umhvørvi. Húsini standa sera væl fyri í hugnaligum, náttúruvøkrum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi 8 min. til gongu frá miðbýnum, og stutt er til skúlar, stovnar, handlar og ítróttarøki.

## Ljós og luft – inni og úti

Stóru vindeyguni geva tær eitt frálíkt samband við umhvørvið og við náttúruna fyri ikki at tala um stóru vindeyguni í ovast hædd, sum geva tær eitt einastandandi vakurt útsýni yvir Havnina og Nólsoyna, har tú hevur samband við fjarumhvørvið út yvir býin og fjørðin. Fleiri hurðar eru, so tú skjótt og brátt kann koma út á útigólvið og út í garðin, so tú hevur samband við nærumhvørvi í tínu egna garði. Takvindeyguni senda ljósið úr erva og niður í stóra miðsavnaða alrúmið, so høgu og stóru konstruktiónirnar síggjast og koma til sín rætt. Alt er gjørt úr allarbesta tilfari og við allarbesta handverki, og einki er spart, tá ið talan er um at gera húsini til eitt livilig, fjálg, hugnalig og repræsantivt. Alt gongur upp í eina hægri arkitektoniska eind, tá talan er um legu, innrætting, tilfar og handverk.

## Stílur og snið

Stílurin er eitt samanspæl av ljósum og myrkum. Ljósu gólvini kasta ljósið aftur úr erva og spæla saman við reydliga dáminum frá Oregon Pinetrænum í loftum og veggum. Húsini eru innrættað, so tú hevur gott samband við húsfólkini, men hinvegin kunnu øll vera í friði og takast við sítt. Stóra hugnaliga alrúmið er savningarstaðið í húsinum, og so at siga alt virksemið gongur út frá tí. Alt er sera væl gjøgnumhugsað og gjøgnumarbeitt og einki er latið til tilvildina.

## Innrætting

Í miðhæddini er inngongd, durur, hall, borðsstova / alrúm við útgongd til terassu, stova, køkur, hjallur, gestawc, hjúnarrúm við klæðnarúmi og baðirúmi, skrivstova / kamar og baðirúm. Í ovastu hædd er stór útsýnisstova við panoramaútsýni yvir allan býin. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, goymslurúm / teknikkrúm, bryggers við útgongd, hjúnarrúm við útgongd til terassu og urtagarð, baðirúm og 2 stór kømur. Harafturat er bilhús til 2 bilar og ein lítil hugnaligt grótlagað gestahús, ið er bygt upp av nýggjum.

## Fakta

**Adressa** .............Dalastígur 2, Tórshavn
**Byggiár:** .............1988
**Hæddir:**...............3
**Gólvvídd:**............280 m²
**Grundøki:**............1.124 m²
**Hjallur:** ................Ja
**Bilhús:** .................Ja









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**